

www.oljan.fo

**Jan Müller** 11 - 11 - 2011

# ExxonMobil inn í Norðurirak

Heimsins størsta oljufelag, ExxonMobil hevur sum tað fyrsta altjóða oljufelagið fingið fótin fastan í Kurdistan í Norðurirak. Felagið gjørdi avtalu um seks leititeigar við sjálvstýrisstjórnina í Kurdistan. Hetta skrivar Financial Time frá eini keldu í KRG. ExxonMobill fer at leita eftir olju og gassi í økinum, sum verður mett at verða líkt uppá kolvetni. Irakiska stjórnin er kunnað um avtaluna, sum eftir øllum at døma er ein nýggj byrjan í tí krígsherjaða landinum. Amerikanska oljufelagið ynskir ikki at gera viðmerkingar til avtaluna. ExxonMobil er eitt av oljufeløgunum, sum er við í oljuleitingini við Føroyar. Nakað herfyri gjørdi felagið av at keypa seg inn í fleiri av loyvunum hjá Statoil í Føroyum. Tey fara at bora ein brunnn í næsta ár. Mynd - Stjórin í ExxonMobil, Rex Tillerson, sum nú hevur latið upp dyrnar til oljuríkidømi í Irak